# Hondbóltsgalla 2003



ATLANTIC AIRWAYS
3arin
FLOGFELAG FØROYA
FØROYA SPARIKASSI
REYNI SERVICE
FØROYA TELE
sohvelsport
SMYRIL LINE
Föroya Bjór
HANDILIN
PE

Tøkk til Nantong, Hotel Hafnia og Hotel Føroyar fyri matin

PLATFORM
discoteque




# Hjálpartól til øll

**Ergo og Hjálpartól er nú flutt í nýggj høli í J.C Svabosgøtu. Hølini uppi á Íslandsvegnum vóru vorðin ov lítil, og nú kann Beinta Lassen endiliga lata handilin upp í nýggjum og stásiligum umhvørvi**

HANDILSLÍV
*Ingrid Bjarnastein*

**Havn:** Handilin, ið selur hjálpartól til rørslu- og menningartarnað, er nú fluttur í nýggj høli. Í dag, hósdag, letur Ergo og Hjálpartól upp í nýggjum og stásiligum umhvørvi niðri í J. C Svabosgøtu 8 í Havn.

– Eg byrjaði við hesum handlinum heima í stovuni hjá mær sjálvari fyri hálvum ørðum ári síðani. Síðani fekk eg høli á Íslandsvegnum, men tey vístu seg at vera alt ov lítil, so teir seinastu átta mánaðirnar havi eg leitað eftir nýggjum hølum, og tað hevur víst seg at vera ógvuliga strævið, sigur Beinta Lassen, sum eigur og rekur Ergo og Hjálpartól.

Handilin selur alt, sum eitur hjálpartól. Alt frá einum gafli til eina song ella ein skutara. Heingjukoyggjur, stólar, pútur, bóltar og leikur til rørslutarnað er bara ein brotpartur av úrvalinum í handlinum.

## Stórur tørvur

Beinta, sum er ergoterapeutur, sigur, at tørvurin á hjálpartólum er ógvuliga stórur. Hetta sæst millum annað aftur í tí, at tá hon byrjaði hevði hon opið bara ein dag um vikuna og annars eftir avtalu. Nú verður opið hvønn dag, og Beinta hevur verið noydd at fáa sær ein afturat sær at hjálpa til.

– Fólk vistu ov lítið um hjálpartól tá eg byrjaði. Runt á stovnunum eru hjálpitólini í ov ringum standi. Tað eru eisini fleiri, sum vilja hava sítt egna ístaðin fyri at fáa frá Hjálpartólamiðstøðini, og vit leiga eisini út til fólk, greiðir Beinta frá, sum leggur afturat, at tað eru fleiri, sum koma heim til summarið og høgtíðir nýta høvið til at leiga sær útgerð.

– Undirtøkan hevur verið góð, so hetta hevur uttan iva verið ein mangulvøra í Føroyum. Stovnar, so sum ellisheim og sjúkrahús hava ikki vitað nakað um hetta.

Ergo og Hjálpartól er einasti handilin av sínum slagi í Føroyum. Fleiri slíkir líknandi handlar eru í Danmark, men teir hava ofta avmarkað úrval.

– Handlarnir í Danmark kunnu halda seg innanfyri eitt serøki. Tað ber ikki til í Føroyum, tí her er so lítið. Eg hevði ongantíð kunna selt bara gaflar!

Handilin er eisini einaumboð av nógvum merkjum í Føroyum, og tí letur handilin eisini hjálpartól til Hjálpartólarmiðstøðini, og skuldi tað stytt nógv um tíðina vøran tekur at koma fram.

– Tær nýtist ikki at vera sjúkur ella rørslutarnaður fyri at keypa her. Her er nógv ergonomisk køksamboð, og harafturat stólar og kontórstólar til øll.

## Viðgerðarstova

Umframt sjálvan handilin hevur Beinta eisini eina viðgerðarstovu. Har tekur hon børn inn til viðgerðar. Tað eru børn við millum annað Down´s Syndrom, tí føroysku sjúkuni, rørslutarnað, børn, sum ikki duga væl at tosa og nógv annað.

– Diagnosurnar spenna seg ógvuliga vítt. Eftirsum eg eri ergoterapeutur, so vildi eg eisini hava eina viðgerðarstovu. Tey flestu koma til tað, sum eitur munn- og andlitsviðgerð, greiðir Beinta at enda frá.

Í dag frá klokkan 14 til 18 er móttøka í nýggju hølunum. Tá ber til at royna og síggja útgerðina, og eisini verður okkurt leskiligt.



*Beinta Lassen er flutt við handli sínum, Ergo og Hjálpartól, í nýggj høli nirði í J.C Svabosgøtu. Handilin letur uppaftur í dag*


Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk
Sosialurin





Pakkaferðir v. uppihaldi
fyri 2 vaksin og 2 børn
við bili fram og aftur

Óhoyrd byrjunartilboð!



Danmørk:
Danland í Blokhus ella Hirtshals í 1 viku 5.995,-
Fráferð 16/5, 23/5, 30/5, 6/6, 13/6



Noreg:
Frítíðardepilin Pers Hotel í Gol í 1 viku 5.995,-
Fráferð 12/5, 19/5, 26/5, 2/6, 9/6, 16/6, 23/6



Hetland:
Easterhoull Chalets í 1 viku 5.995,-
Fráferð 12/5, 19/5, 26/5, 2/6, 9/6, 16/6, 23/6

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggju-kamari við wc/bað innv. og uppihald á einum av omanfyrinevndu støðum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo